Oljurisin Clair úr dvala:

# Nýggj oljuleið nærkast á Atlantsmótinum

OLJA
*Jan Müller,*
*jan@sosialurin.fo*

Um nakrar fáar mánaðir, móti endanum av hesum árinum, byrjar fyrsta oljuframleiðslan frá tí risastóra oljufeltinum Clair, vestan fyri Hetland. Hetta er største fundið, er gjørt á bretska landgrunninum yvirhøvur og varð fundið gjørt í 1978. Ikki fyrr enn nú 25 ár seinni hevur borið til við nýggjastu tøknini at menna ein part av oljufeltinum. Talan er um eina íløgu uppá fleiri milliardir kr. Fyri stuttum varð sjálvur oljupallurin fluttur út á feltið og settur á beinini. Talan er um eina konstruktión, sum vigar 11.000 tons. Hetta er samtíðis heimsins tyngsta konstruktion, sum er flutt á hjólum á landi nakrantíð. Oljupallurin er settur saman á skipasmiðjuni í Wallsend í Bretlandi. Tað er fyritøkan, AMEC, sum hevur staðið fyri arbeiðinum. Tað var serútgjørdi kranabáturin Saipem 7000, sum flutti tunga pallin á endaastøðina á leiðinum millum Hetland og Føroyar.



*Oljupallurin, sum vigar 11.000 tons verður settur á beininini á Clairfeltinum vestan fyri Hetland. Ein nýggj epoka í oljuvinnuni á Atlantsmótinum. Mynd David Gold í BP blaðnum Horizon.*



*Clairfeltið er risastórt Tað var funnið í 78, og nústaðni er tøknin so framkomin at farast kann undir framleiðslu. Longu nú er rørleiðing løgd frá Clair til Sullom Voe. Vit síggja eisini gassleiðingina, sum er løgd frá Schiehallion við føroyska markið víðari framvið Clair og til Sullom Voe. Ein infrastrukturur er við at gerast veruleiki á Atlantsmótinum, og kann hesin eisini fáa stóran týdning fyri framtíðar fund á føroyska landgrunninum. Oftani er nettupp infrastrukturin grundarlagið undir metingum hjá oljufeløgunum, skulu tey byggja felt út.*

Um henda fyrsta royndin at menna Clairoljufeltið eydnast til fulnar, so verður av álvara tosað um at byggja út við enn einum oljupalli og møguliga tveimum.

Altjóða oljuvinnan hevur stórar vónir til Clairfeltið, sum loksins fer undir framleiðslu. Framleiðslan fer at fáa stóran týdning fyri leiting á Atlantsmótinum, tí nú er infrasstrukturur tøkur. Keldur í oljuverðini vilja vera við, hetta kann koma at skunda undir aðrar útbyggingar eisini. Frammanundan eru bara tvey øki farin undir framleiðslu, nevniliga Foinaven og Schiehallion. Nú er so Clair komið aftrat og helst verður eisini Suilvenfeltið nær føroyska markinum eisini bygt út.

Um vit so gita, at Cambofeltið við markið er so mikið lønandi, at tað eisini verður bygt út, tá má sigast, at Atlantsmótið hevur fingið ta tyngd og tann týdning, sum londini og oljuvinnan hevur havt ynskium. At fleiri øki á Atlantsmótinum eru og verða boðin út bæði á føroyskum og bretskum øki kann so eisini vera við til at seta heilt nýtt ljós á hetta økið, sum fyri ikki so nógvum árum síðani var mett at vera alt ov váðiligt og ókent til at gera størri íløgur í.

# Gongu- og sjórænaratúrur við Johannu leygardagin

**Børnini fara í skúla mánadagin - í Suðuroynni hendir ein rúgva leygardagin**

FERÐAVINNA
*Tíðindaskriv*

Leygarmorgunin gongutúrur Øravík - Porkeri:

Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági kl. 10.00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30 til Øravíkar.

Gingið verður inn til hagaportrið omanfyri Øravík. Gingið verður framvið

Tinggilinum Uppi millum Stovur, har suðuroyingar í gomlum døgum hildu ting. Landslagið er sermerkt við gilum og hvøssum ryggum. Her er eisini Tingborðið og helst fer onkur at fortelja søgnina um Snæbjørn sum dømdur at arbeiða 4 ár í bolti og jarni á Bremerholm.

Gingið verður um Mannaskarð og her er framúr gott útsýni ein góðveðursdag yvir Dalin og Hovsvøtnini. Vit ganga eystanfyri Laganfellið og oman til vøtnini. Síðani framvið ánni eftir vegagilið. Komið verður yvir til grótbrotið í Skørðini. Staðkend heimildarfólk eru við á túrinum

Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi úr Porkeri til ávikavist Kunningarstovurnar í Vági og á á Tvøroyri. Latið bilin standa við kunningarstovurnar, eftirsum bussur koyrir er ikki neyðugt at hava egnan bil til gongutúrarnar. Soleiðis hevur gongufólkið ikki høvuðbrýgg eftir loknan túr, at fara eftir bilinum við byrjunarstaðið fyri gongutúrin.



*Gongufólk hvíla seg frá túrinum tann 3. juli*

### Tilmelding og prísur

Kostnaður fyri gongutúrin og busskoyring er kr. 100,- fyri vaksin men fyri børn er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/ 284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

Leygardagin kl. 17 sjórænaratúrur við sluppini Johannu

Serligt barnatiltak verður leygardagin við Johannu.

Johanna fer av bryggjuni í Vági kl. 17.00, hon loysir frá landi, men fer bara stutt útfrá og leggur stilt millum flakavirkið og grótkastið. Johanna verður aftur um 19 tíðina.

Børn frá 0 - 100 ár ílætin sum sjórænarar hava atgongd. Hvat fer at henda er ein loyna enn. Børnini sjálvi eiga løtuna og fara helst at spæla teimum vaksnu eitt puss.

### Gott at hava við!

Øll sum koma umborð mugu onkursvegna verða ílætin sum sjórænarar. (turriklæði um høvdi ella eygnaklaffa fyri ella kanska hava eitt svørð við).

Verið í heitum og góðum klæðum, góðum skóm ella styvlum.

### Tilmelding og prísur

Tað er avmarkað luttøka til hetta tiltakið. Kostnaður fyri hvønn kr. 70,- íroknað prísin er ábit og tostadrykkur umborð á Johannu.

Bindandi tilmelding til túrin skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.



*Frá vinstru Eyðstein, Árni, Sirið, Rani og Nancy.*

## Teistaveitsla á Sandi

**Teistin siglir um kvøldið**
**- og tað skal feirast**

GRILL
*Tíðindaskriv*

Endiliga ber til at vera alt kvøldið á Sandoynni! Teistin er farin at sigla seint - og tí bjóða vit í grillveitslu á sandinum á Sandi fríggjakvøldið, sigur Sandoyar Kunningarstova og Ungmannafelagið Virkið í tíðindaskrivi.

– Matinum taka vit okkum av - tað er bara at koma suður til størstu sandstrond í Føroyum at hugna sær. Og norðuraftur slepst klokkan 22.30.

Vit tendra grillirnar klokkan 18.00, men Teistin siglir fyrsta túr av Gomlurætt longu klokkan 07.30, so tað ber til at njóta oynna allan dagin.

Til dømis ber til at síggja hana frá vestursíðuni - fríggjadagin fer seksæringurin Hvíthamar tríggjar túrar vestur um Sandoynna. Klokkan 10, klokkan 14 og 17.30.

Báturin er góðkendur til 12 ferðafólk, og Jóan Petur Clementsen, ið sjálvur hevur smíðað bátin, er skipari. Pláss kunnu bíleggjast á Kunningarstovuni á Sandi

Um kvøldið sleppa børnini ein túr í ánni Niðri á Sand við jollu, um tey eiga eina 10-krónu. Vit syrgja fyri bjargingarvestum.



Sálmar frá køkinum

# - Norskir køkskallar og gamlir dreingir

**Kim Simonsen**

Í 1950'inum sóu vit vælferðasamfelagið í Norðanlondnum menna seg. Arbeiðararrørslan var sterk, og ein kollvelting tók ferð. Nú skuldu øll Norðanlond hava vøkstur og vælferð. Tryggleikin skuldi setast í hásæti. Serliga Svøríki gjørdist kent um allan heimin sum landið, ið gjørdist eitt sætt »Fólkaheim«. Nú varð ikki tosað um stættir, men um fólkaítrott, fólkaleikhús o.s.fr. Undir hesi tíð broyttist áhugin frá ognarrætti til hvussu samfelagsbúðskapurin skuldi skipast á besta hátt.

Vælferðasamfelagið skuldi skapast við at fáa fólk at hava ein vilja og eina stáltrúgv á framburð. Í Noreg gjørdist almuniumsverkið í Årdal sett fram sum ein fyrimynd. Hetta var ein góð tíð fyri teknokratar. Hetta var tiðin fyri homo faber & verkfrøðingin.

Norski filmurin »Salmer fra køkkenet«, er ein skemtilig søga um, hvussu ein teknokratisk nevnd í einari serligari tíð í søguni, gerst til skammar, tá hon vil granska lívið hjá gomlum dreingjum, serliga hvussu teir brúka køkin við positivistiskum og behavioristiskari ástøði. Svenska stjórnin hevur sett eina nevnd, ið skal bøta um virkisføri hjá svenskum heimagangandi konum. Teir eru komnir á, at svenska heimagangandi húsmóðirin á hvørjum árið gongur ein tein, ið svarar til túrin frá Svøríki til Kongo. Kunnu teir bøta um hetta, kann túrurin styttast til teinin: Svøríki - Norðuritalia. Á ein ella annan máta eru hesir serfrøðingar komnir fram til, at teir mest effektivu kokkarnir, ið finnast eru gamlir dreingir í Noreg. Sviar fara tí í holt við at senda eina fylgi av bilum við húsvognum til Noregs at kanna gamlar dreingir í bygdini Landstad. Hvør eygleiðari skal sita í køkinum á einum høgum eygleiðarastóli í seks vikur hjá einum gomlum dreingi og niðurskriva alt teir gera.

### Einabúgvin og eygleiðarin

Eygleiðarin Folke skal sita hjá gamla dreinginum Ivar. Hugurin er tó lítil hjá Ivari at lova Folke inn at byrja við. Ivar er ein sannur einabúgvi. Spakuliga kemur Folke tó innum og hann og einabúgvin byrja eitt langt og mangan stuttligt spæl um at tiga longst.

Tað er ikki so ofta vit hoyra um norskan film. Seinastu árini eru tó komnir nakrir nýggir og góðir filmar úr Noreg. Eitt stórt frambrot var filmurin »Ælling«. Í mun til Danmark og Svøríki er Noreg eitt filmmenningarland. Danir hava t. d. Carl. T. Dreyer og Lars von Trier. Sviar Ingmar Bergmann, Bo Widerberg og Roy Andersson os.fr. Norsk filmsøga er í mun til hetta í altjóða høpi eitt óskrivað blað. Tað var t. d. danin Henning Carlsen, ið vann palmurnar við filmatiseringini av Hamsunsa »Sult«. Men nú byrja norðmenn so smátt at reiðrast. Norski leikstjórin Bent Hamer, ið hevur leikstjórnað »Salmer fra køkkenet« hevur fyrr leikstjórnað vældámda filmin »Æg«, ið hevði ein serligan norskan humor. Í hesum filminum hevur hann lagt seg eftir at lýsa eina dámliga søgu um stórar misskiljingar. Filmurin snýr seg eisini um tveir einsamallar menn og teirra vaksandi vinalag. Í løtuni ger Hamer eina filmatisering av søguni »Factorum« eftir amerikanska bohémin Charles Bukowskis.

### Tekniskur rationalitetur

Filmurin er ein stuttlig keipumynd av einari teknokratiskari nevnd, ið við positivistiskari atferð viðger menniskju sum hundar. Gamlir dreingir í Noreg eru alt annan enn hundar og gera ikki hvat ein rationel tulking annars kann siga frammanundan. Øll verkætlanin gerst til skammar, tá gomlu dreingirnir byrja at tosa við eygleiðarnar og spurningurin er nú hvør eygleiður hvønn?

Hamer hevur funnið fram ein stuttligan metafor, ið fer aftur um okkara norðurlensku mentanarsøgu og stóra álitinum vit hava til vælferðasamfelagið. Onkunsvegna eru individualistisku gomlu dreingirnir ikki ein partur av nýggju tíðini. Teirra áhugi er ikki at gerðast teir mest effektivu kokkarnir, men at hava onkran at tosa við.

Tað sum er serliga stuttligt er 50'ara-estetikkurin og stóri mentanarsamanstoyturin. Hetta er ikki ein stórur filmur, meiri ein fín lítil norsk skemtisøga.

***Salmer fra køkkenet***
Noreg, 2003. 92 min.
Havnar Bio 13 august - 14 august, kl. 17 & sunnudagin 15 august kl. 16.30
Bent Hamer.
*Við eru:* Joachim Calmeyer, Tomas Norström, Bjørn Floberg, Sverre Anker Ousdal m.fl.




Kórleiðarin og tónasmiðurin:

# Hans Jákup Højgaard 1904-1992

**Ein 100 árs markering**

**Thomas S. Anderssohn Rithøvundur av bókini »Komponisten Hans Jákup Højgaard…« 2003**

Tað eru í ár 100 ár síðani ein av teimum týdningarmestu persónunum í føroyskum tónleikalívi varð borin í heim - nml. kórleiðarin og tónlistamaðurin Hans Jákup Højgaard. Hetta verður markerað m. a. við eini konsert í Fríðrikskirkjuni inni á Toftum sunnudagin tann 15. august.

Højgaard byrjaði virksomu breyt sína í einari gróðrartíð, bæði í mentanarlívi og samfelagsgongd. Við tónasmiði sínum, útsetingum og broytingarstarvi sínum nøktaði hann ein tørv eftir tjóðskaparligum tilfari á móðurmálinum. Útlendsk tónaløg og tekstir vórðu býtt burtur fyri føroysk ella løg við føroyskum eyðkenni/sermerki.

Hann bar komandi ættarliðum vísusiðvenjuna í kórbúna. Skrivaði niður sálmar og vísur, sum vóru um at doyggja, og lærdi fleiri ættarlið, hvat sangur og kórsangur kunnu hava at týða í øllum liðum sínum.

»Burtur úr einum lítlum óvitaflokki og einum - væl størri - flokki av ungfólki skapar hann eina harpu sum hann spælir á og fær at lýða tær minstu rørslur við skjarmu sínum. Tað er rætt og slætt lystiligt at hoyra«.

Virksemi hansara byrjaði undir hóvligum og lítillátnum viðurskiftum í heimbygdini og menti seg, sum árini gingu, so stórliga, at nakar neyvan hevði droymt um tað. Sanginspektørens Stedfortræder Ejnar Boesen, sum gjørdi eina kunningarferð til føroyskar skúlar várið 1936, gav fylgjandi úttalilsi til inspektionen í Danmark um Højgaard og sangundirvísing hansara:

»Jeg kan udtale, at hans elever - Børnene i Tofte Skole - sangligt stod højt over Børnene i samtlige andre færøske Skoler (ca. 20) som jeg besøgte, og at de i flere Henseender stod Maal med de bedste i det egentlige Danmark…«

Sum kórleiðari bleiv hann gjøgnum sínar konsertferðir við Toftakórinum - ikki minst tær, ið man gjørdi til Havnar um jólatíð í tíðarskeiðinum 1937-1953 - ein fyrimynd og undangongumaður fyri onnur; bæði fyri kórleiðarar og kórsangarar afturat vakti ans fyri kórsangi millum manna.

Í ummælinum sínum av konsertini í sjónleikarhúsinum í 1937, har Højgaard og sangkór hansara fyri fyrstu ferð sungu, skrivaði William Heinesen fylgjandi:

»Vit Tórshavnarar hava mest sum vant okkum til ta hugsan, at tað finst einki nýmótans sanglív í Føroyum uttan í høvuðsstaðnum; men avgjørt er tað, at vit hava verið á skeivari leið… Sum dirigent hava vit valla sæð hans líka fyrr í Føroyum, hann var alla tíðina eldur og sál og tykist vera tónleikari til botns. Ongantíð áður… er tað komið so týðuliga fram sum hetta kvøldið, at føroyingar eru eitt sangfólk«.

Tað hjá Højgaard og kórum hansara, ið vakti ans, var tann stóra tónagávan, tey vístu, og tann reini songurin.

»Det må straks siges, at korets kunstneriske standard er forbavsende høj. At sangglæden og dens ægte indlevelse var højst bemærkelsesværdig og meget smittende« skrivaði recencenten K. Ø. um konsertina hjá Havnar Sangfelag í Sønderborg í 1958 og helt áfram: »Der blev sunget rent indtil det pinagtige, og intonationerne var flotte…«

Sum skilst vann Højgaard ikki einans viðurkenning heima í Føroyum uttan eisini uttanlands sum umboð fyri føroyskan kórsang.

Ein onnur síða av hansara listarliga virksemi var ivaleyst tónasmíð - sum vit kunnu ásanna hevur givið fleiri føroyingum fleiri perlur til felagssangin. Eg kann t. d. nevna »Einki er sum summarkvøld við strendur«, »Hon stóð har við rokkin og spann«, »Tórshavn« o. s. fr., o. s. fr. Meginparturin av tónaverkum Højgaards eru savnað og givin út í søvnini Føroysk Songløg sum komu út í 1951 og 1977.

Áhugi hansara fyri at smíða løg rakk um ein mansaldur, líka frá tí at hann var 24 ára gamal og las til lærara festi eyguni við nótaarkið á fyrsta sinni - við sanginum »Tíðin rennur sum streymur í á« til hann um 80 ára aldur orsakað av viknandi eygum kendi seg noyddan at gevast.

Hjá Højgaard var »føroyski tónin« eitt lyklahugtak: av fleiri orsøkum. Skuldi ein fáast við tónasmíð var siðvenjan ikki týdningarleys. At hann hinvegin eisini tók undir við donsku tónasmiðunum Thomas Laub, Carl Nielsen, Thorvald Aagaard og Oluf Ring - sum gingu undir heitinum »firkløveret« var einki hindur fyri sannføring Højgaards. Hann ynskti v. ø. o. at føra »føroyska tónan« aftur til fólkið - ein uppalingarligur tanki hann helt fast við alla ævi sína. Eitt sera gott dømi har hesin føroyski tóni lýsir ígjøgnum er vígslukantatuni »Fedranna tala« Højgaard skrivaði til vígsluna av kommunuskúlanum í Havn í 1956. Orðini átti Heiðn Brú.

»Hann loftaði hini stevføstu rytmu í hinum føroysku kvæðunum og tjóðløgunum, og hann flutti hetta fram á slíkan hátt at nútíðarmaðurin steðgaði á, lurtaði og fataði gongulagið hjá farnum ættarliðum, havið og gjálvið og alt tað, sum føroyskt er - og ikki minst ervalýsið, gudsóttan og forleikan«. Ólavur Michelsen í 14. september 1969:56.